# T OG SMÁTT



## LANDING

*Bæði størri skip og smærri útróðrarbátar selja sína veiðu umvegis Landingarmiðstøðina í Sørvági. - Her kemur nógvur fiskur uppá land, sigur Wentzel Mouritsen, formaður á miðstøðini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## 1158 pund

Umframt tær stóru lastirnar, fekk Landingarmiðstøðin somuleiðis væl av fiski frá útróðrarbátum mikudagin. Sambært Sandoyarportalinum tók miðstøðin ímóti fiski frá 10 útróðrarbátum, harav 9 teirra vóru úr Sandoynni. Tilsamans landaðu teir 8.604 pund, av hesum átti útróðrarbáturin Hvíthamar av Sandi 1158 pund. Hinir bátarnir vóru: Birtu Lias, Boðaberg, Fiskaklettur, Katrin, Oddur Ytri, Orion, Røðin og Syðraberg sum allir eru úr Sandoynni, umframt Sunnevu ið landaði umvegis Miðvágs havn.

beinleiðis at bjóða ímóti hvørjum øðrum.

Her hjá Landingarmiðstøðini verður alt gjørt umvegis ein teldu. Her kann Wentzel tí fylgja við søluni umvegis ein telduskíggja, – eini sølu, ið kann taka styttri ella longri tíð, alt eftir hvat og hvussu nógv er í útboði.

– Tað vísir seg, at eru stórar nøgdir, so kann sølan taka langa tíð. Er nøgdin hinvegin minni, verður tað sjálvandi avgreitt skjótari, vísir hann á.

### Lítil upsi

Áhugavert er eisini at fylgja við, hvussu sølan gongur og ikki minst, hvørjir keypararnir eru. Alt hetta gevur nýggja tøknin møguleikar fyri.

Á telduskíggjanum stendur í øllum førum greitt, at keypararnir koma úr øllum heraðshornum kring landið.

Ein onnur skipan er, at um til dømis eitt virki í Sandoynni keypir upsan hiðani av Landingarmiðstøðini í Sørvági, verður veiðan koyrd suður, samstundis sum útróðrarfiskurin haðani verður tikin við aftur vestur til Sørvágs.

– Tíverri hevur ikki verið so nógvur upsi at fáa í seinastuni, staðfestir Wentzel Mouritsen.

snorri@sosialurin.fo



## ÚTRÓÐUR

*Hvíthamar hevur landað fleiri ferðir til Landingarmiðstøðina í Sørvági. Mikudagin legði hann 1158 pund uppá land*

*Mynd: sandportal.fo*